# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

11. januar fingu Camilla Eið og Ólavur Debess, Vági, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4000 gr.

13. januar fingu Margit Sørensen og Páll Kristiansen, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3690 gr.

13. januar fingu Marjun D. og Jan Erik Jacobsen, Fuglafirði, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3350 gr.

13. januar fingu Gladys og Eyðun á Kósini, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4600 gr.

14. januar fingu Sølva Heinesen og Sveinbjørn Olsen, Argjum, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3700 gr.

14. januar fingu Eyðgunn Dam, Vestmanna, og Ernst Johannessen, Kollafirði, tvíburðar, dreingir. Annar var 50 cm langur og vigaði 2700 gr., hin 50 cm langur og vigaði 2900 gr.

14. januar fingu Durita Petersen og Børge Due Sørensen, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4000 gr.

15. januar fingu Gunn og John Dávid Joensen, Runavík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4090 gr.

15. januar fingu Maibritt og Martin Sivertsen, Norðdepli, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3250 gr.

18. januar fingu Signa Skorastein og Hans Pauli við Misá, Leirvík, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4210 gr.

18. januar fingu Jeanette Joensen og Petur Martin Sømark, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3800 gr.

18. januar fekk Ada Joensen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3310 gr.

20. januar fingu Elsebeth og Óttar á Lofti, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 57 cm long og vigaði 2720 gr.

## Minningarorð um

# Jens Paula á Lofti

## Sandavágur

**Føddur 10. september 1935 Deyður 9. oktober 2004**



Jens Pauli er farin um sýn og eftir standa minnini. Hann vaks upp í Sandavági, foreldrini vóru Leivur Johannesen, Norðan fyri Vegg í Hesti og Jensina Heinesen á Lofti í Sandavági. Leivur og Jensia átti 9 børn, tríggjar gentur og seks dreingir, Jens Pauli var næstelstur í flokkinum. Sigast kann, at barnaárini vóru trygg og góð. Leivur sigldi sum skipari og Jensina var heima hjá børnunum. Jens Pauli hevði sína dagligu gongd heim á Loft, har mammubeiggjarnir, Dánjal og Edvard búðu, haðani fekk hann nógv gott í beinini.

Gott grannalag var við húsini omanfyri veg, har hjúnini, Petur Heinesen, vanliga nevndur Petur á Lofti og konan Maria Johannesen ættað úr Hesti, vóru systkin at hjúnunum niðan fyri veg. Børn teirra vóru sostatt dupult systkinabørn; sigast kann, at har var gott samskifti báðar vegir.

Jens Pauli hevði tvey lívsstørv, hann var skipsførari og seyðabóndi. Førdi skip úti í heimi og var fleiri mánaðar heimanífrá. Minnist, tá hann kom aftur frá langfarti, hvussu glaður og vældámdur hann segði frá tí, hann hevði upplivað á síni ferð. Vit, ið lurtaðu kundu ímynda okkum hvussu spennandi og eisini syrgiligt tað kundi vera úti í heimi. Skjótt lat hann seg úr teimum ljósu klæðunum og lat seg í gerandisklæði, sum oftast var knæbuksir, vadmalskot og hettu, tí seyðurin og hagin skuldu røkjast. Jens Pauli var ognarbóndi, dámdi væl at ganga í haganum og røkta. Har gekk hann í egnum tonkum og í huganum livdi saman við forfedrunum, ið høvdu traðkað somu gøtur, og lært hann alt um seyð, bø og haga.

Jens Pauli sigldi mest sum øll árini, líka til pensjónsaldur, tá hann legðist uppi. Hann gleddi seg til, at hann nú burturav kundi taka sær av haganum; hann hevði stórar ætlanir fyri haganum. Hvønn morgun var hann snimma á fótum og fór til verka; ein kundi undrast á, hvaðani øll hansara orka kom frá.

Konu fekk hann av Glyvrum. Jens Pauli og Elinborg vóru nakað tilkomin, tá tey gingu saman í hjúnalag. Børnini hjá teimum vóru børnini úr báðum ættunum, ið javnan vitjaðu tey; ikki var dagur, at ikki okkurt barnið var uppi hjá teimum og vitjaði. Eyðsæð er, at tey hava havt tað gott har, tí tey hildu á fram at vitja øll barnaárini og halda fram, nú tey sjálvi hava fingið børn. Seinastu nógvu árini hevur systurdótturin, Jenny verið hvørja fríløtu hjá teimum, til stóra gleði fyri tey bæði.

Deyðin kann koma bráðliga. Eingin hevði væntað, at dagarnir hjá Jens Paula, vóru taldir, tá hann varð sendur til Havnar at kannast fyri onkran treða, hann hevði følt sær. Fáar dagar frammanundan hevði hann verið á fjalli; seinni sama kvøldið lærdi hann ein av teimum ungu kynstrið at fletta.

Familjukærur var hann sum fáur; hvørja ferð onkur minnisdagur varð hildin í familjuni, var hann við. Tá tey sjálvi hildu onkran dagin sást, at tey høvdu ein stóran vinarskarða, tí mong vóru tey, ið leitaðu til Sandavágs at gleðast saman við teimum, og blíðskapurin var altíð stórur; hesin stóri skarin sást aftur, tá hann var borin til sín seinasta hvíldarstað.

Jens Pauli var fosturlandskærur, hevði stóra virðing fyri søguni og tí, ið farið er. Vit dýpa høvur og lýsa frið yvir minnið um Jens Paula á Lofti.

**Kristianna**

## Andlát

12. januar
Marianna Øster, Tvøroyri, 89 ár.

13. januar
Sofus Eide, Nólsoy, 55 ár.
Andrias Hilduberg, ættaður úr Fuglafirði, bús. í Hvidovre, 75 ár.
Ebbe Pedersen, bús. í Miðvági, 62 ár.

15. januar
Rikkardur Jónsson, ættaður úr Saksun, bús. í Ólavsvík í Íslandi, 73 ár.
Ebba Winther, Tórshavn, 80 ár.
Esther Joensen, Mykines, bús. í Miðvági, 83 ár.

17. januar
Margretha Rustin Johannesen, vanliga nevnd Diddan, Fuglafjørður, 77 ár.
Astrid Joensen, fødd Berg, Hvalba, 93 ár
Freilif Petersen, Vági, 55 ár

## Ólavur Asafsson 50 ár



Sunnudagin 23. januar fyllir Ólavur Asafsson Olsen í Søldarfirði 50 ár.

Ólavur er søldfiringur, sonur Áslu og Asaf Olsen. Hann er giftur við Súsonnu f. Isaksen, sum eisini er úr Søldarfirði, og eiga tey børnini: Joan 23 ár, Andy 20 ár, og Ásu Mariu, sum er 12 ár. Tey áttu eisini sonin Andi, sum var føddur í 1977. Andi doyði 5 ára gamal av løstunum hann fekk í eini ferðsluvanlukku í august 1982.

Eftir lokið realprógv í Runavík í 1971, fór Ólavur í læru sum maskinsmiðjur á Skála Skipasmiðju og var útlærdur í 1975. Síðan sigldi hann í eitt ár ella so, til hann fór á maskinskúla í Havn. Sum nýklæktur maskinmeistari var hann eitt skifti við rækjuskipinum Logos úr Gøtu.

Ólavur tók víðkað maskinmeistaraprógv í Keypmannahavn í 1981 og var maskinmeistari við Gullfinni (nú Høgaberg) fleiri ár í 80-unum.

Eitt skifti meðan konan, Súsanna, nam sær útbúgving í Danmark, var familjan øll búsitandi í Nivå, nakað norðanfyri Keypmannahavn. Hesa tíðina starvaðist Ólavur sum maskinmeistari hjá Københavns Havn, har hann var sera væl dámdur. Har stóð honum í boði fast leiðandi starv, men longsilin eftir heimlandinum var ov sterkur.

Eftir tað sigldi hann sum meistari við útlendskum skipum, eitt nú grønlendskum, í nøkur ár. Síðst í 80-unum byrjaði Ólavur at arbeiða hjá KJ-Hydraulik á Kambsdali og bleiv seinni settur í fast starv. Fyri fýra árum síðani tók hann við sum stjóri í fyritøkuni, har tað í dag starvast eini 45 fólk.

Ólavur er ein dugnaligur maskinmaður, hann hevur leiðaraevni og dugir væl at skipa fyri, hann sigur sína meining og er vitugur. Hann hevur stóran áhuga í føroyska vinnulívinum og situr í fleiri nevndum. Til kommunuvalið í november í fjør var Ólavur valdur í býráðið í Runavíkar kommunu. Hetta er tó ikki fyrstu ferð, tí hann sat eisini í hesum sessi valskeiðið 1996-2000.

Ólavur er NSÍ-ari um ein háls. Sonurin Andy leikar á besta liðnum, og ofta sæst "stjórin" við tasku krevja inn til dystir við Løkin. Familjan býr á niðara vegnum í Søldarfirði, á staðnum tey kalla Lygnes. Ólavi dámar væl at "putlast" kring húsini. Tá kvøldini leingjast, og veðrið loyvir tí, sæst Ólavur ofta fríðka um rundan um húsini, har mold og eyrur so smátt er broytt til ein urtagarð. At handalagið og ikki minst tolið er gott, er tann stásiligi grótgarðurin, sum hann hevur lagað fram við vegnum, eitt gott dømi um.

Vit ynskja Ólavi hjartaliga tillukku við 50 ára degnum sunndagin.